# Trívist best í rokanum



*Eftir trý ár á besta liðnum hjá KÍ skal Høgni Madsen nú roknast millum berandi kreftirnar hjá ÍF*

**Eitt pláss mitt á ÍF-miðvøllinum var meira lokkandi ein kjansurin sum bakkur í Klaksvík. Høgni Madsen trívist best, tá spælið er meira rokaligt, og hann er ikki bangin fyri at siga sína meining**

Verður tosað um Høgna Madsen, so slepst neyvan undan at nevna hendingina, sum í neon-skrift varpaði ljós á venjaratrupulleikan í Klaksvík.

Sjónvarpsmyndirnar tosaðu sítt týðiliga mál, tá fuglfirðingurin vísti sína ónøgd við venjarastílin hjá Tony Paris, og tó at venjarin stutt eftir hetta fekk sekkin, so bar hendingin eisini eitt innanhýsis leikbann til Høgna við sær.

- Eg vil ikki siga, at eg eri nakar rebellur. Men eg sigi mína meining, tá eg haldi tað vera neyðugt. So er tað sjálvandi spurningurin, hvussu umheimurin fatar støðuna, sigur Høgni, sum ásannar, at hendingin ta ferðina er ein av teimum vanligu spurningunum til hansara, tá fótbóltstos er á skránni.

Men hann leggur samstundis dent á, at júst tann hendingin einki sum helst hevur at gera við, at hann ikki longur spælir í KÍ-búnanum.

- Eg skifti til KÍ, tí eg helt tað ljóðaði sum ein sera spennandi avbjóðing. Og eg havi eisini trivist serstakliga væl í felagnum.

- Sum spælari havi eg tó soleiðis, at mær dámar best at vera í rokanum á miðvøllinum. Í Klaksvík gav venjarin til kennar, at mítt pláss í størri mun fór at verða á bakkinum, og tí gjørdi eg av at skifta aftur til ÍF. Soleiðis hevur frá báðum síðum verið spælt við opnum kortum, og tað er einki agg í viðurskiftunum millum meg og KÍ, sigur hann.

**Vil vera í sentrum**

Tað at Høgni sigur sína meining, er heldur ikki bara galdandi fyri tað, sum fyriferst uttan fyri vøllin.

Á vøllinum telist hann millum teirra, sum náttúrliga taka ábyrgd. Og best dámar honum, um stigini veruliga skulu stríðast heim.

- Tað er jú ein partur av spælinum hjá mær. Mær dámar væl at vera rættiliga uppgearaður til ein dyst. Eisini sjálvt um tað onkra tíð kanska verður ov nógv av tí góða, soleiðis at onkur býtt kort fella. Men í Klaksvík vóru vit so nakrir, sum plagdu at skiftast um at fáa hesi, sigur hann.

Júst tann parturin verður kanska eisini øðrvísi í Fuglafirði. Í leiklutinum sum harði hundurin á miðvøllinum verður Høgni kanska meira einsamallur í Fuglafirði.

- Tað verði eg kanska. Í øllum førum haldi eg, at hetta leggur meira ábyrgd á meg. Bæði tí eg á miðvøllinum eri meira blandaður í spælið, men eisini tí eg her teljist millum meira royndu spælararnar, sigur Høgni, sum fer í holt við sítt sætta ár í fremstu føroysku fótbóltsdeildini.

**Opið stríð millum sjey lið**

Og verður tosað um komandi árið, so ivast Høgni ikki í, at ÍF hevur góðar møguleikar at gera seg galdandi.

- Eg rokni við, at NSÍ, EB/Streymur og HB eru tey sterkastu liðini. Men millum hini sjey kann alt henda. Fyrst og fremst skulu vit sjálvandi syrgja fyri, at vit ikki flyta niður, men eg ivist ikki í, at vit væl kunnu gera okkum galdandi hampuliga langt uppi á talvuni.

So talan verður kanska um nógvar dystir, har stigini skulu stríðast heim?

- Tað vóni eg. Um so er, so gevur tað hópin av intensum dystum, og hesir eru altíð stuttligari at spæla, heldur hann.

Givnu umstøðurnar hava havt við sær, at ÍF longu undan kappingarbyrjan hevur havt tríggjar venjarar, og tann fjórði var ávegis, tá hesar reglur vórðu skrivaðar. Men kortini heldur Heldur Høgni, at teir eru so væl fyri, sum til ber, nú árið veruliga skal byrja.

- Tað hevur sjálvandi órógvað nakað, at so hevur verið, men slíkum fær eingin vart seg fyri. Abraham hevur so tikið við hesar seinastu vikurnar, og hann hevur gjørt eitt framúr arbeiði. Hann er eisini ein persónur, sum allir lurta eftir, og sum eg havi skilt tað, so hava hann og David Jones, sum ætlandi verður venjari, eisini støðugt verið í samband við hvønnannan. So vit eru til reiðar, nú dystirnir telja, sigur stríðsmaðurin, sum eisini er til reiðar at siga øðrum, hvar skápið skal standa.

---

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

## Metingin

**Frá flestu síðum verður roknað við, at ÍF fær tað ógvuliga trupult hetta kappingarárið. Hópurin tykist tó hampuliga væl styrktur, og fær liðið eina góða byrjan upp á árið kann hendan bera heilt langt. Hinvegin kunnu trupulleikarnir gerast alstórir, um unga liðið frá byrjan fer at liggja tungt á stigatalvuni.**

XEROX
formula.fo